# HEILSANIR



**Góða allarbesta omma**
Hjartaliga tillukku vid 50-ára degnum 8. okt. Takk fyri at tú altíð er so góð við meg. Muss og klemm
**Elia**



**Góða fitta Marta**
Hjartaliga tillukku við tínum eitt ára degi. Øll góð ynskir í framtíðini.
**Heilsan omma og abbi í Gøtu**



**Til okkara elskaðu Martu**
Vit 3 ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum. Tú ert ein sólstrála sum vit gleðast yvir hvørja ferð. Vit síggja teg.
**Heilsan tann søtasta gubbin, góðu fastur og stuttliga pápabeiggja**



**Góða fitta Marta**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum 6. oktober. Vit elska teg.
**Muss og klemm frá mammu og babba**



**Góða kona og mamma**
Hjartaliga tillukku við stóra degnum 28.09. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Ynskja maður og synir**



**Góða fitta Marta**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 6. okt. Keðiligt at eg ikki er heima, fari at leingjast eftir tær. Vónandi fært tú ein orduliga góðan dag.
**Alt tað besta frá mostur**



**Hey fitta Marta**
Tillukku og gleði á tínum 1 ára degi. Her ert tú orduliga fitt.
**Heilsan Pippi**



**Góða elskaða Marta**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Muss og klemm frá ommu og abba í Fuglafirði**



**Góða mostir og systir**
Vit vilja bara ynskja tær tillukku við 30 ára degnum tann 6 okt. UHADADA 30 ár, tá er man nokkso gamal. Nei tvætl góða, gott nokk verður tú 30 ár, men tú sært ikki út til at vera 1 dag yvir 20 ár. Vit elska teg góða.
**Heilsan Sigmund og Maiken**



**Góða mamma**
Tær verður ynskt hjartaliga tillukku á tí runda degnum. Vónandi fært tú ein góðan dag. Alt tað besta
**Børnini**

**Goða mamma og omma**
Hjartaliga tillukku við 55 ára degnum. Minst til at baka hinar brunu smákakurnar :-)
**Heilsan børn og ommubørn**





**Góði babba**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við tí stóra degnum. Her liggur tú væl. Gott tú onkuntíð tekur tær av løttum.
**Heilsan Barbara, Rebekka, Unnur og Birita**



**Góði elskaði Heri**
"Hvat gera vit við tann ovurupphitaða búskapin?" Vit vita, at tú hevur svarið á tínum føðingardegi leygarkvøldið, sum vónandi verður enn heitari.
**Heilsan vit úr Aros**



**Góði abbi**
Tillukku við 50 ára føðingardegnum! Takk fyri at tú altíð tímir at arbeiða saman við mær í havanum.
**Heilsan Uni**

